

*Á FaroExpo og Mentanarvikuni ganga vinna og mentan hond í hond. – Hetta hevur víst seg at rigga sera væl, sigur Rannvá Troest*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# FaroExpo veksur á hvørjum ári

**- Enn eru allar tilmeldingarnar ikki endaliga komnar upp á pláss, men alt bendir á, at talið av føroyskum og útlendskum fyritøkum verður heldur størri hesaferð enn seinasta ár, sigur Rannvá Troest, verkætlanarleiðari, sum eisini veit at siga, at Hotel Sjómansheimið í Runavík verður fullsett hesar dagarnar, FaroExpo varar**



*Hetta er fjórða árið á rað, at skipað verður fyri FaroExpo og Mentanarviku í Runavík. Hetta er soleiðis vikan, tá vinna og mentan ganga hond í hond og seta sín dám á økið. Rannvá Troest er verkætlanarleiðari fyri Sp/f Virkisráðgevingina í Saltangará, sum stendur aftanfyri FaroExpo*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað er Sp/f Virkisráðgevingin í Saltangará, ið stendur sum fyriskipari av FaroExpo, og verkætlanarleiðari fyri tiltakinum hesaferð er Rannvá Troest.

Undanfarin ár hevur hon eisini verið aktivur partur av FaroExpo, men hesaferð er hon so formellur verkætlanarleiðari.

Saman við Símuni Hammer, sum eigur og rekur Virkisráðgevingina, Herthu Olsen og nú eisini Lív R. Kjeld, sum hjálpir til hesar seinastu dagarnar uppundir tiltakið, er tað Rannvá, sum stendur á odda fyri, at tiltakið fer at eydnast.

Rannvá hevur sum altíð góðar vónir. Hon er positiv, og hon er ein arbeiðshestur, sum dugir væl at leggja til rættis og skipa fyri.

- Jú, tað gongur rætta vegin, og tá tiltakið fer av bakkastokki mánadagin, 20. oktober og fundarvirksemið byrjar týsdagin, 21. oktober, ivast vit onga løtu í, at alt er komið upp á pláss.

Tað er Ítróttarhøllin í Runavík, sum er karmur um sjálva FaroExpo-stevnuna, har fyritøkurnar, sum við eru, havi høvi at fundast við hvørja aðra. Hin parturin av FaroExpo er ráðstevnan, sum fer fram í Kelduni í Skálafirði seinnapartin mikudagin, 22. oktober.

FaroExpo endar hósdagin, 23. oktober.

### Búgva í Runavík

Rannvá sigur, at flestu útlendsku luttakararnir koma sunnukvøldið og mánadagin komandi, og síðan fara tey avstað aftur hósdagin ella fríggjadagin í næstu viku. Flestu fyritøkurnar eru útlandinum eru úr Danmark og Noregi.

- Enn eru allar tilmeldingarnar ikki endaliga komnar upp á pláss, men alt bendir á, at talið av útlendskum fyritøkum verður umleið 20 og talið av føroyskum fyritøkum millum 25 og 30.

Hon sigur, at Hotel Sjómansheimið í Runavík verður fullsett hesar dagarnar, FaroExpo varar.

- Útlendsku gestirnir koma í fyrsta lagi at búgva á Hotel Sjómansheiminum, har 19 kømur eru uppi á, og riggað er til seks kømur aftrat niðri undir.

Rannvá sigur, at onkur fer at búgva í summarhúsum, og síðan fara fólk, sum umboða einar tvær fyritøkur, at búgva í Havn.

### Fundarhátturin

Alt bendir á, at samlaða talið av fyritøkum á FaroExpo hesaferð verður nakað størri enn seinast, men kortini eru tað tó framvegis stórar føroyskar fyritøkur, sum ikki eru við.

- Enn er hátturin, sum FaroExpo byggir á, lutfalsliga nýggjur í Føroyum, og tí eru tað fyritøkur, sum enn ikki hava givið sær far um teir møguleikar, sum veruliga liggja í júst hesum konseptinum.

Rannvá sigur, at sum heild er tað soleiðis, at tær fyritøkur, sum hava verið við einaferð, gjarna koma við aftur, meðan aðrar fyritøkur, sum ongantíð hava luttikið, kanska ikki síggja teir stóru møguleikarnar við FaroExpo.

- Hetta við ávísari fundarætlan og fundartíðum, har fyritøkur velja at fundast við hvørja aðra eftir ávísum skifti, er líkasum ikki gingið upp fyri øllum, sum tann frálíki møguleiki, tað er.

Hon sigur, at umframt vanligu einstøku básarnar, verða aftur hesaferð ein reiðarabásur, har føroysk reiðaríir fara at húsast og ein alibásur, har umboð fyri alivinnuna í Føroyum fara at halda til.

### Ráðstevnan almenn

Rannvá Troest vísur á, at ráðstevnuparturin, sum gongur fyri seg í Kelduni í Skálafirði seinnapartin mikudagin, er almennur móti luttøkugjaldi.

- Luttøkugjaldið er 680 krónur fyri hvønn einstakan, men luttaka fleiri frá somu fyritøku, fæst avsláttur í gjaldinum.

Hon sigur, at møguleikar eru heilt fram til týsdagin, 21. oktober, at tekna luttøku til ráðstevnuna, og tilmelding fer fram á heimasíðuni hjá FaroExpo.

- Fyrilestrarnir, sum verða hildnir, eru rættiliga áhugaverdir og viðkomandi fyri eitt nú vinnulívsfólk. Tí kunnu vit bert mæla fólki, sum annars ikki eru við á FaroExpo, til at luttaka í ráðstevnupartinum í Skálafirði.

### Vinarbýarvitjan

Meðan FaroExpo og Mentanarvika eru, fær Runavíkar kommuna eisini vitjan úr Hjørring, sum er vinarbýur hjá Runavíkar kommunu.

- Ein bólkur við borgarstjóranum í Hjørring á odda kemur higar, og síðan luttekur eisini ein mentanarligur bólkur úr Hjørring, sum samstundis kemur at verða partur av Mentanarvikuni.

Hugskotið við samlaða tiltakinum er júst, at vinna og mentan ganga "hond í hond" hesar dagar.

- Hetta er eitt konsept, sum hini árini hevur víst seg at rigga sera væl, og soleiðis vænta vit eisini verður í ár, sigur Rannvá Troest, verkætlanarleiðari.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*